# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Jan Hentze skal døma Bretland og Spania



*Føroyski altjóða flogbóltsdómarin, Jan Hentze, hevur fingið eina stóra dómarauppgávu í juli, tá hann skal døma tveir manslandsdystir millum Bretland og Spania í European League-kappingini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Føroyski flogbóltsdómarin hevur higartil fingið sína størstu altjóða uppgávu. Í juli skal hann døma tveir European League-dystir millum Bretland og Spania. – Hetta er eitt stórt herðaklapp, sum eg ikki hevði væntað at fingið longu nú, sigur Jan Hentze**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað hevur gingið við rúkandi ferð hjá Jan Hentze, sum dømdi sín fyrsta altjóða dyst í desember 2004. Hesi gott og væl fýra árini hava so ofta verið boð eftir honum, at hann í summar fer upp um teir hálvthundrað dystirnar sum altjóða dómari.

At talan ikki bara er um kvantitet, men eisini kvalitet, gekk sjón fyri søgn í fyrradagin, tá hann fekk at vita, at hann í juli mánaði tekur stigið heilt upp í toppin, tí á dómaraportalinum hjá europeiska flogbóltssambandinum, CEV, sá hann, at hann nú skal døma sín fyrsta landsdyst ímillum tvey landslið á hægsta stigi.

– Eg havi sjálvandi dømt landsdystir fyrr, tí har hava verið onkrir vinardystir hjá Føroyum, onkrir unglingadystir í NM, umframt onkrir dystir á Oyggjaleikum. Men hetta verður altso fyrstu ferð, at eg skal døma tveir dystir, sum eru á nógv hægri stigi enn alt tað, eg havi dømt áðrenn, sigur Jan Hentze.

Talan er um tveir dystir í European League-kappingini millum Bretland og Spania, sum verða spældir í Bretlandi vikuskiftið 10. til 12. juli. Bretland roynir at spíla seg út og fáa bygt eitt gott lið upp til olympisku leikirnar í London í 2012, meðan Spania fyri tveimum árum síðani var nummar fýra í EM-endaspælinum og telist millum fremstu flogbóltstjóðir í Europa.

## Kanska nummar 50

– Hetta er eitt stórt herðaklapp, sum eg ikki hevði væntað at fingið longu nú, tí eg havi ikki dømt so leingi til tað. Sjálvur hevði eg roknað við, at eg skuldi bíða eitt sindur enn, áðrenn eg fór at fáa nakran dyst av hesum slagnum, sigur føroyski altjóða flogbóltsdómarin.

– Eg helt sjálvur, at eg var komin øgiliga langt, tá eg í fjør dømdi eina av áttandapartsfinalunum í CEV Cup-kappingini, men avrikini hjá mær munnu hava verið góð, tá eg nú fái hesa avbjóðingina, sum altso er rættiliga stór.

Jan Hentze skal døma teir báðar dystirnar, sum helst verða spældir í Sheffield, saman við danska dómaranum, Birger Christensen, sum onkuntíð hevur verið í Føroyum og dømd. Fyrra dystin verður Jan annardómari, men seinna dystin verður hann fyrstidómari.

– Um eingin annar dystur verður á skránni hjá mær áðrenn hesar, verður hesin seinni dysturin, har eg eri fyrstidómari, mín altjóða dystur nummar 50. Men eg ivist í, um dagurin verður so rundur kortini, tí helst skal eg døma onkrar dystir á Oyggjaleikunum á Álandi, og kanska verður onkur annar dystur áðrenn tað eisini, sigur Jan.

Teir báðir dystirnir millum Bretland og Spania eru í European League-kappingini, sum er eitt slag av steypakapping fyri landslið, sum CEV hevur tey árini, tá eingin EM-kapping er. Fýra tey bestu koma í eitt endaumfar, har spælt verður um at gerast besta liðið í Europa tað árið.

# Dráttur og ÍF liggja framvið

**Av teimum fýra liðunum, sum hava møguleika at fáa silvur- ella bronsuheiðursmerki í Eik-liguni hjá kvinnum, eru tað bara ÍF og Dráttur, sum spæla um vikuskiftið.**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Hóast SÍ longu hevur tikið gullið, er framvegis stórur spenningur eftir í kappingini hjá flogbóltskvinnunum, tí har eru ikki færri enn fýra feløg, sum kappast um silvur- og bronsuheiðursmerkini.

Tvey av teimum, ÍF og Dráttur, hava sunnudagin heimavøll ímóti ávikavist TB og KÍF, sum eru einastu liðini, ið ongan møguleika hava at fáa nakað heiðursmerki.

Bæði ÍF og Dráttur hava spælt ein dyst færri enn Fleyr og Mjølnir, sum tey nú kappast við, og hartil hevur ÍF so eisini fyrimunin av at vera eitt stig framman fyri Drátt, ájavnt við Mjølnir og bara trý stig aftan fyri Fleyr.

Og ÍF má sigast at hava ein lættan dyst sunnudagin, tá TB vitjar á Kambsdali, tí tvørakvinnur eru nógv viknaðar og eiga enn fyrsta sigurin til góðar hetta kappingarárið.

Hinvegin krevst helst meira av Drátti, sum á Giljanesi tekur ímóti KÍF, sum bara er tvey stig aftan fyri og á einum góðum degi kann geva sjálvt teimum bestu dygga mótstøðu. Kvinnurnar úr Kollafirði hava eitt nú vunnið á meistarunum úr SÍ!

Nógv bendir tó á, at kvinnukappingin er uppaftur javnari, tá hesir báðir dystirnir sunnudagin eru farnir aftur um bak, so enn kann nógv henda í Eik-liguni hjá kvinnum.

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 17 | 15 | - | 2 | 48 | 22 | 26 | 19 |
| 2 Fleyr | 16 | 10 | - | 6 | 35 | 25 | 10 | 13 |
| 3 Mjølnir | 16 | 9 | - | 7 | 28 | 28 | 0 | 10 |
| 4 ÍF | 15 | 8 | - | 7 | 30 | 26 | 4 | 10 |
| 5 Dráttur | 15 | 8 | - | 7 | 33 | 28 | 5 | 9 |
| 6 KÍF | 16 | 5 | - | 11 | 27 | 38 | -11 | 7 |
| 7 TB | 15 | 0 | - | 15 | 4 | 45 | -41 | 0 |

## Menninir frí

Hinvegin er alt longu avgjørt í Eik-liguni hjá monnum, sum hevur frí um vikuskiftið og ikki spælir aftur fyrr enn um eina viku, tá seinasta umfarið er á skránni.

Har hevur ÍF longu langt síðani vunnið føroyameistaraheitið og gullið, og fyri viku síðani gjørdist somuleiðis greitt, at SÍ fær silvur og Mjølnir bronsu, meðan menninir hjá Fleyr mugu taka til takkar við einki heiðursmerki at fáa hesa ferð.



*Bæði Fleyr, Mjølnir, ÍF og Dráttur kappast um silvur- og bronsuheiðursmerkini í Eik-liguni hjá kvinnum. Um vikuskiftið hava ÍF og Dráttur møguleika at taka seg longur fram í hesi kappingini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*